## Jan Hentze úr at gera

Altjóða flogbóltsdómarin, Jan Hentze, hevur úr at gera. Í gjár dømdi hann dyst millum KSV og Holte í donsku elitudeildini, og í annaðkvøld skal hann døma eina áttandapartsfinalu í Challenge Cup í Kekkia. Somuleiðis hevur hann fingið at vita, at hann síðst í hesum mánaðinum skal døma eina fjórðingsfinalu í Challenge Cup hjá kvinnum, annaðhvørt í Finnlandi ella Hvítarusslandi.



## Varpa út í Suðuroy

Nakrir tvøramenn hava tikið stig til, at meira ljós verður varpað á ítróttin í oynni, serliga flogbólt og fótbólt. Byrjað var við einum 1. deildardysti í fjør millum TB og B36, og síðani hevur útvarpingin á netinum vundið upp á seg. TB-studio hevur vikuliga sending um ítróttin í oynni, sum kann síggjast og hoyrast á www.tb.fo sunnukvøld klokkan 20, umframt at leinkjur eru til gamlar sendingar.

### VB-StÍF 29-23 (14-12):

# VB heldur í lívlínuni



Fyri bara aðru ferð hetta kappingarárið eydnaðist VB at vinna dyst í Sunset-kappingini. Talan var at kalla um seinasta útkall, um VB skal gera sær vón um at bjarga tilveruni í bestu deildini

Mynd: Áki Bertholdsen

**Tá mest stóð á eydnaðist tað hjá VB at vinna tvey stig, soleiðis at liðið enn heldur fast í bjargingarlínuni**




Jákup Mørk

VB er framvegis niðasta liðið í Sunset-deildini, og enn sum áður hóttir niðurflytingin liðið.

Undan dystinum hesa ferð hevði liðið veruliga knívin á barkanum. Tapið á heimavølli móti VÍF bar við sær, at treytirnar til liðið nú vóru púrasta greiðar. Tveir dystir móti StÍF og ein móti VÍF skulu allir vinnast, og fyrsta partin av hesum avgreiddi VB sunnudagin.

Móti StÍF bar tað nevnliga til, sum ikki hevur borði til so leingi.

Allan dystin var VB omaná, og tær tóktust stevna móti eini trivaligari hálvleikskleiðslu, áðrenn StÍF við tveimum skjótum málum aftur skapti spenning í.

Tann spenningurin helt sær, til einir átta minuttir restaðu at spæla. Verjan hjá VB hevði staðið væl allan dystin, og tá tær saman við málverjanum púrasta læstu málið av, fekk heimaliðið skrætt seg leyst, og so var fagnaðurin øgiligur.

Enn er arbeiðið ikki liðugt – onkur vildi kanska sagt langt ífrá. Men samstundis er ein góð byrjan ikki at forakta, og nú hava kvinnurnar úr Vági framvegis alt at spæla fyri í teimum báðum útidystunum, sum skulu spælast móti StÍF og VÍF.

Hartil er eisini ein heimadystur móti Neistanum, og kann hesin kasta eitt og kanska tvey stig av sær, er als ikki víst, at VB er so langt frá bjargingini, sum tað annars hevur verið líkt til.

## FAKTA

**VB-StÍF 29-23 (14-12)**
**10 min:** 3-4
**20 min:** 9-6
**40 min:** 16-16
**50 min:** 21-19
**Málskjúttar**
**VB:** Migle Senvaityte 11(4), Svava Vestergaard 7, Bára K. Mortensen 3, Monika Samuelsen 3, Christina Holm 3, Una Egilsdóttir 1, Andrea Nielsen 1
**StÍF:** Rebekka Justinussen 10(4), Roxanna Bodirlau 3, Fríðrún Danielsen 2, Bára Berthelsen 2, Adrianna Dobra 2, Rósa Danielsen 1, Annika Petersen 1, Oddrun Danielsen 1
**Brotskøst:** VB 4, StÍF 4
**Útvísingar:** VB 3, StÍF 4
**Dómarar:** Thomas Juul Thomsen & Magnus í Króki

# Trúgvin komin aftur

**Sigurin á StÍF hevur kveikt vónina hjá VB um, at tað ber til at lívbjarga sær í Sunset-deildini**




Jákup Mørk

- Hatta var øgiliga gott. Sigurin hevði alt at siga hjá okkum, tí sjálvandi er tað einki stuttligt, um tú bara upplivir tap.

Orðini eigur ein væl nøgd Christina Holm hjá VB, sum saman við liðfeløgunum fegnaðist um, at næsti sigurin á árinum var komin til høldar.

- Sjálvandi er tað framvegis trupult hjá okkum, tí vit mugu vinna útidystirnar móti bæði StÍF og VÍF. Í so máta hevði sigurin alt at siga, tí taptu vit, so var liðugt. Men avrikið í dag ger eisini, at vit veruliga hava eina trúgv uppá, at tað kann bera til. Verjuparturin riggaði nógv betur, enn hann hevur gjørt í allan vetur, og í álopinum gekk eisini heilt væl. Migle ger sjálvandi stóran mun, og eisini spælda Svava Vestergaard ein branddyst á veinginum, sigur Christina Holm.

## Botnstríðið

| | |
|---|---|
| 07.02 | StÍF-Neistin |
| 07.02 | Stjørnan-VB |
| 07.02 | Tjaldur-VÍF |
| 14.02 | VB-Tjaldur |
| 21.02 | StÍF-Stjørnan |
| 21.02 | Neistin-VÍF |
| 21.02 | Tjaldur-VB |
| 28.02 | VÍF-StÍF |
| 28.02 | VB-Neistin |
| 07.03 | VÍF-VB |
| 07.03 | Tjaldur-StÍF |
| 14.03 | StÍF-VB |
| 14.03 | Stjørnan-VÍF |
| 21.03 | VÍF-Tjaldur |
| 21.03 | Neistin-StÍF |
| 21.03 | VB-Stjørnan |